LM-080/2020

RAVNUR
TRYGGINGARMEKLING
Arne Vatnhamar
+298 28 10 80
+45 21 61 72 61
ravnur@ravnur.fo
á gaddi 4, 520 Leirvík
www.ravnur.fo

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið

24. november 2020

Sent sum t-postur: uvmr@uvmr.fo

Mál nr.: 20/00505 - Hoyringssvar

Tann 3. november 2020 varð løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarviðurskifti, sent til hoyringar.

Hóast uppskotið ikki er sent til hoyringar hjá føroysku tryggingarmeklarunum, loyva vit okkum at gera niðanfyristandandi viðmerkingar til uppskotið – tað er hóast alt virksemið hjá fyritøkum eins og okkara, sum í stóran mun verður ávirkað av uppskotinum.

Í lógaruppskotinum verður tilmælt at loyva vinnuligari miðlan av tryggingum fyri ávísum váða í tryggingarfeløgum í ES/EBS londum, uttan mun til, um sínámillum sáttmáli er gjørdur millum viðkomandi land og Føroyar.

Vit skulu í hesum sambandi viðmerkja, at tað longu nú er loyvt hjá føroyskum felagi av sínum eintingum at keypa trygging í londum, sum Føroyar ikki hava sínámillum sáttmála við.

Í sama viðfangi loyva vit okkum at viðmerkja ta heldur marghátttligu støðu í verandi lóggávu, at eitt felag av sínum eintingum kann keypa trygging uttan mun til landamørk, men leitar viðkomandi sær serkøna hjálp frá meklara, verður marknaðurin avmarkaður til Føroyar, Ísland og Danmark.

Lógaruppskotið fevnir um hesar tryggingar:

- Skrokktrygging av flogførum, smb. tryggingarflokk 5
- Ábyrgdartrygging fyri flogfør, smb. tryggingarflokk 11
- P&I-trygging fyri før við bruttotonsatali á 300 ella meira, smb. tryggingarflokk 12
- Flogvallarábyrgd, smb. tryggingarflokk 13

Hóast vit heilsa broytingini vælkomnari, sum eitt fet rætta vegin, er talan tó bert um eitt lítið fet, og enn er langt á mál.

Sum tryggingarmeklari renna vit okkum regluliga í trupulleikan, at føroyski tryggingarmarknaðurin er nakað afturúrsilgdur í mun til umheimin, tá hugsað verður um váðaavhyljing gjøgnum trygging. Hetta kemst bæði av skerdu kappingini á føroyska marknaðinum orsaka av avmarkingunum í verandi lóggávu, og av, at føroyskt vinnulív hevur voksið seg út um verandi føroyska tryggingarmarknaðin við feløgum í m.a. Stórabretlandi og USA.

Kappingin á føroyska tryggingarmarknaðinum

RAVNUR
TRYGGINGARMEKLING
Arne Vatnhamar
+298 28 10 80
+45 21 61 72 61
ravnur@ravnur.fo
á gaddi 4, 520 Leirvik
www.ravnur.fo

Tað er lítil ivi um, at grundtankin í verandi tryggingarlóg um sínámillum rætt avmarkar kappingina á føroyska marknaðinum munandi, og er við til at forða fyri, at føroysku tryggingarfeløgini gjøgnum kappingartrýst uttanífrá menna teirra tænastur til tess at nøkta tørvin hjá føroysku vinnuni.

Soleiðis er torført hjá føroyska vinnulívinum at fáa gagn av útlendskum trygginum, mentar til betri at avhylja tørvin hjá vinnulívinum anno 2021. Umframt tryggingarnar, ið eru fevndar av hesum lógaruppskoti, og sum kanningin hjá Tryggingareftirlitinum vísir, at tørvur er á, kunnu nevnast:

- Garantitryggingar
- Prosjektábyrgdartryggingin - Owner's Protective Professional Indemnity Insurance
- Samansettar arbeiðstøkutryggingar fyri verkætlanir við serligum váða, t.d. sjókaðalar

Í mun til garantitryggingar skal viðmerkjast, at meðan hesar í Føroyum eru at rokna sum bankavørur, so verða tær flokkaðar sum tryggingar í londunum rundan um okkum.

Trongu karmarnir í føroysku tryggingarlóggávuni fyri at feløg, við hjálp frá meklara, kunnu keypa trygging í útlendskum tryggingarfeløgum, geva føroysku tryggingarfeløgunum ein stóran fyrimun yvir meklarum umvegis endurtrygging. Vit síggja javnan, at trygging frá útlendskum tryggingarfeløgunum verður veitt gjøgnum føroyskt tryggingarfelag, sum endurtrygging, men har tryggingarskjalið er á upprunamálinum, og gjaldið sum tryggingartakarin skal rinda, fer óskert til útlendska tryggingarfelagið; eitt nú loðstryggingar og ráðgevaraábyrgdartryggingar. Virksemi hjá føroyska tryggingafelagnum kann í slíkum førum reelt javnsetast við meklaravirksemi, men uttan somu virkisavmarkingar, ið eru galdandi fyri meklaran.

Havast skal eisini í huga, at føroyskur váði longu í stóran mun er tryggjaður uttanlands, eisini í feløgum, sum ikki hava heimstað í Danmark og Íslandi. Tryggingarmarknaðurin í Føroyum er soleiðis skipaður, at næstan allur váði verður fluttur uttanlands gjøgnum endurtrygging. Bert ein minni brøkpartur verður reelt avhyldur í føroysku feløgunum. Soleiðis er markið fyri nær Trygd keypir endurtrygging vanliga í mesta lagi 4 mió. kr., meðan markið hjá Betri vanliga í mesta lagi er 15 mió. kr.

Sum tryggingarmeklarafyritøka eru vit (sjálvandi) ónøgd við, at verandi lóggáva gevur tryggingarfeløgunum fyrimum, serliga tá havt verður i huga, at meðan meklarin einans hevur áhugamál kundans fyri eyga, er virksemið hjá tryggingarfeløgunum at selja tryggingar til kundan.

Føroysk vinnulív í útheiminum

Fleiri føroysk samtøk eru nú vorðin so stór, at tey eiga feløg uttan fyri landoddarnar, t.d. í Stórabretlandi og USA

RAVNUR
TRYGGINGARMEKLING
Arne Vatnhamar
+298 28 10 80
+45 21 61 72 61
ravnur@ravnur.fo
á gaddi 4, 520 Leirvík
www.ravnur.fo

Undir verandi lóggávu er ikki loyvt hjá føroysku tryggingarfeløgunum at tryggja váða í t.d. áðurnevndu londum. Heldur ikki eru nógv tryggingarfeløg, sum eru undir eftirliti av mynguleikunum í londum, sum Føroyar hava gjørt sínámillum sáttmála við, sum klára at handfara eitt nú amerikanskan váða.

Føroysku samtøkini eru tískil noydd til at brúka eina fragmenteraða tilgongd til tryggingarkeyp við staðbundnum tryggingum. Verandi lóggáva forðar soleiðis fyri, at samtøkini kunnu fáa gagn av at skipa tryggingarviðurskiftini sum samtakstryggingar.

Fyri at feløgini kunnu skipa tryggingarviðurskiftini so skynsamt sum gjørligt er einasti møguleiki, at grundtankin um sínámilum rætt heilt ella partvís verður sleptur, og loyvt verður, at allur føroyskur váði kann tryggjast í tryggingarfeløgum í ES/EBS londum.

Niðurstøða

Hóast lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at betra kappingina á føroyska tryggingarmarknaðinum, er uppskotið eftir okkara tykki alt ov lítið framsøkið, og nøktar langt frá tørvin. Vit duga at síggja, at uppskotið bara í minni mun hjálpir uppá støðuna hjá kundum okkara, sum eisini í næstum fara at keypa trygging í stríð við broyttu lógina.

Fyri at koma kappingarundirskotinum á føroyska tryggingarmarknaðinum til lívs, samstundis sum tørvurin hjá størstu føroyskum fyritøkunum at skipa teirra tryggingar á besta hátt samsvarandi eitt samtak við altjóða virksemi, er neyðugt at fara munandi longur, enn lagt verður upp til í hesum uppskotinum.

Um skipanin av føroyska tryggingarmarknaðinum skal framtíðartryggjast, er neyðugt í minsta lagi at innlima tryggingarflokkarnar 8, 9, 13, 14, 15 og 16 í uppskotið.

Vinaliga

Ravnur Tryggingarmekling
Arne Vatnhamar